TING-HELLAN

# Føroya Drottning



TINGHELLUKLUMMA
*Kári á Rógvi*

Virðislønina fyri besta avrik fyri føroysk áhugamál uttanlands fær í ár Margretha drottning. Í donsku myndabløðunum og donsku tíðindasendingunum ganga tey kongaligu í 'nationaldragt' (ikki í 'folkesamfundsdragt.') Drottningin heldur røðu á føroyskum og krúnprinsurin sigur seg vilja læra seg føroyska málið. Vanliga fær danin helst ikki fær tað nógva við um Føroyar, men nú brennur seg í minnið, at drottningin alment ikki bert er donsk, hon er multietnisk.

Hetta er ikki nýtt. Danski kongurin var vanur at samskifta á týskum við tegnar sínar í hertugadømunum sunnanfyri Danmark, og var ríkisovasti, sum tikið var til, "i alle vore riger og lande." Okkara tilknýti til kongsættina er eldri enn tilknýti okkara til Danmarkar, og tað vóru søguligar tilvildir - at norska kongsættin arvaði donsku trúnina og seinni misti Noreg - sum førdu til verandi ríkisstøðu.

Týðiligt er, at mangir føroyingar enn eru trúgvir ímóti og góðir við kongsættina. Føroyingar hava søguliga litið á kong, og meðan fáur harmast fútadeyða, munnu mong gleðast um monarkiið. Eisini teir fullvaldaðu íslendingar fegnast um kongsættina. Donsk vikubløð eru nærum eins vanlig í Íslandi sum her heima, og 'Þórhildur danadrottning' (drottningin er eisini doypt Þórhildur) er sera høgt í metum. Fleiri halda, at var ikki abbi hennara Christian X so óstórsligur sum íslendskur kongur - møtti á túsundárahaldi altingsins í donskum generaluniformi - ja so var kongsveldi í Íslandi enn. Tá íslendingar á sinni søgdu "vér mótmælum allir," gjørdu teir tað í kongsins navni og endaðu fundin við at rópa 'leingi livi kongur vár.'

Vit føroyingar áttu at duga sama kynstrið. Drottningin átti at havt egið føroysk flagg við føroyskum vápnaprógvi - kongsættin hevur jú brúkt veðrin í øldir - á sama hátt sum skyldkona hennara Elizabeth, ið er 'Lord of Man' umframt drottning í øðrum londum og ríkjum við mongum ymsum fløggum og vápnum. Eisini tann leingi saknaði føroyski heiðurskrossurin átti at verið stovnaður sum ordan við drottningini sum stórmeistara - kanska á ólavsøku næsta ár.

Men samstundis mugu vit broyta skipanina við ríkisumboðsmanni. Hesin eigur sjálvsagt at vera føroyingur, eins og ríkisumboðið á oynni Man; hetta kundi verið eittnú onkur hugfarsligur fólkalívsfrøðingur, ið væl megnaði at røkja samskiftið við forsætisráðharran, men serliga við hovið. Í staðin sigst ein nýggjur Dahlerup at vera á veg úr uttanríkisráðnum, tí danska ráðnum, sum einsamalt heldur uppá føroyska 'regeludstedende kompetence' og sum fornoktar at tilknýti okkara til Danmarkar er ígjøgnum kongsættina og ikki ígjøgnum - sum forsætisráðharrin tók til - "grundloven og sådan noget."

Leingi livi drottning vár!

# Søgufalsan ella óvitinheit?

TINGHELLUKLUMMA
*Thomas Arabo*



### Nýggju karmarnir - fólksins vilji?

Ja, tað sær soleiðis út. Bara ein flokkur, ið umboðar ein minniluta av føroya fólki leikar í ímóti lógunum. EU er í tí øvugtu støðu. Har hava politikararnir samtykt nakað, sum ein meiriluti av fólkinum ikki vil vita av. Nýggju karmarnir eru væl í tráð við sjálvstýrislógina hjá Javnaðarflokkinum. Sjálvstýrislógin var tilevnað einaferð í 80'unum, men hon bleiv nokk ikki almenn, fyrr enn fyrst í 90'unum, tí, sum Atli Dam sáli plagdi at siga, tingini mugu búnast og ein má hava fólkið við. Nú kunnu vit skipa okkum sum vit vilja og ganga sjálvstýrisleið, um tað er viljin, og um ein meiriluti einaferð vil fara úr danska ríkinum, so verður tað gjørt.

### Blokkstuðulsmytan

Blokstuðulsniðurskurðurin er aftur á bananum. So vítt eg dugi at síggja, so royna tjóðveldisfólk at umskriva søguna, ella eru tey bara óvitandi um blokkin. Heri Mohr roynir at geva teimun tann tekniska veruleikan inn við skeið - hann kennir alt hatta og hevur altíð skil í tí, hann sigur. Eg skal royna at skoyta eitt sindur uppí frá tí politisku síðuni. Refusiónin frá statinum, sum tað so flott kallaðist, bleiv partvís koyrd í blokk í 1988. Tjóðveldisflokkurin, sum var við í Landsstýrinum tá, vildi hava alt í ein blokk, sum so skuldi fara inn á fíggjarlógina. Vit í javnaðarflokkinum søgdu nei til at almanna og heilsuverkið skuldi við í blokkin, tí vit vóru bangin fyri at pengarnir so endaðu sum stuðul til fiskivinnuna. Í 1993 fór so øll refusión í blokkin, og hetta var eftir kravi frá dønum. Teir vóru væl bangnir fyri, at vit og teir mistu tamarhaldið á kreppuni, um skipanin ikki bleiv foreinklað.

### Vinnulívstuðul og blokkur

Longu í 1992 bleiv lóggivið um niðurskurð í stuðulinum til fiskivinnuna soleiðis, at tá blokkurin bleiv, sum hann var áðrenn niðurskurðin, so var longu stórur partur av hesum stuðuli burtur. So har hevur blokkurin ongantíð verið nýttur. Tjóðveldisformaðurin eigur at vita at søgufalsan kann ikki gerast, meðan aktørarnir liva.

### Tey ríkastu og skattalættar

Tjóðveldisformaðurin sleingir um seg, við at skattalættin, ið nú verður givin, fer til tey ríkastu. Tað, veit hann, passar ikki, tí tey hægstløntu í hesum landinum eru vard av 50% regluni ið ger, at tey stórt sæð hvørki kunnu fáa hægri ella lægri skatt. Lættin sigst vera størstur hjá inntøkum á umleið 20.000 krónur um mánaðin. Har eru nógvar barnafamiljur og ungfólk ið akkurát hava sett búgv, og soleiðis sum samfelagið undir fullveldislandsstýrinum er gliðið í móti at verða eitt brúkaragjaldssamfelag, so haldi eg ikki, at vit eiga at verða so forargaði inn á hendan bólkin, sum nú verða útnevnd til at vera tey ríku í samfelagnum.

### Tey lægstløntu og brandskatting

Tá íð tjóðveldisflflokkurin gjørdi oljugjaldið fast, so var tað einki minni enn harðasta brandskatting av láglønarfólki í nýggjari tíð - hvørki meira ella minni. Harafturat so sleppur ein næstan ikki út um einar dyr, uttan onkur skal hava eitt brúkaragjald.

### Blokstuðulsniðurskurðurin - ein brølari

Hvussu víkir og vendir, so var tað ein brølari at forera danskarunum hasar pengarnar. Ein faktura skal enda onkustaðni, og givið er, at fíggjarlógin kann ikki síggja út sum hon ger í allar ævir, og burturforkláringar hjá tjóðveldisfólki muna lítið í tí spælinum.